Búskapur og vinna:

## Meiri til gomul og veik

Danska stjórnin helt mikudagin sín fyrsta fund um fíggjarlógina næsta ár. Stjórnin vil ikki siga, hvussu nógv hon ætlar at spara næsta ár, men sambært fjølmiðlunum er talan um einar tríggjar ella fýra milliardir krónur.

Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri segði aftan á fundin, at stjórnin fer at játta meiri pengar til tey gomlu, sjúku og veiku, og at meiri pengar verða til skúlaverkið, kunningartøkni og gransking.

Spurdur, hvaðani pengarnir skulu koma, tá skattasteðgurin skal standa við, svaraði forsætisráðharrin, at tann spurningin hevur stjórnin ikki tikið støðu til enn. Nógv bendir tó á, at nakað verður spart á játtanini til menningarhjálp, eins og gjørt er í ár.

## Tollsvik

Norska tollvaldið hevur avdúkað, at fleiri fiskavirkir í Norðurnoregi hava sent fisk á ES-marknaðin sum russiskan fisk, hóast fiskurin í veruleikanum var frá norskum skipum. ES krevur 10 prosent hægri toll fyri russiskan fisk enn fyri norskan fisk. Við at svika kunnu norsku virkini seta prísin niður og harvið økja søluna, sigur norska tollvaldið, sum metir málið sera álvarssamt.

Higartil hevur tollvaldið kannað viðurskiftini á trettan fiskavirkjum í Norðurnoregi, og kanningarnar vístu, at øll virkini høvdu svikað við toll reglunum.

## Selja postin

Stjórnin í Danmark ætlar at umskipa almenna postverkið Post Danmark til partafelag og at selja 25 prosent av partabrøvunum. Nær tað verður, er ikki greitt, men Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri hevur sagt, at ætlanin verður framd, tá tíðin er tann rætta til at fáa ein góðan handil burturúr. Sambært einum lógaruppskoti skal nýgja partafelagið lagast eftir galdandi lóg um partafeløg.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Prestur í Betlehem stúrir fyri hópdrápi



*Egyptiskir studentar á lærda háskúlanum í Kairo mótmæla ísraelsku framferðini í teimum palestinsku sjálvsstýrisøkjunum. Egyptaland sleit mikudagin alt samband við ísraelsku stjórnina*

*Mynd: Reuters*

**Presturin í Føðikirkju Jesu Krists í Betlehem vil hava altjóða samfelagið at fyribyrgja einum hópdrápi í kirkjuni**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*

Fleiri hundrað ræðsluslignir palestinar hava seinastu dagarnar leitað sær skjól inni í kirkjuni, sum sambært kristnu kirkjuni stendur á tí staðnum í Betlehem, har Jesus varð borin í heim. Ísraelski hermenn hava kringsett kirkjuna.

Fyrr í vikuni eydnaðist tað einum italskum sjónvarpsliði at sleppa inn í kirkjuna, og har hittu tey prestin Ibrahim Faltas.

- Vit biðja altjóða samfelagið, heimsins lond, bjarga okkum, segði presturin við italsku sjónvarpsfólkini, sum sluppu burtur úr Betlehem mikudagin.

- Verður einki gjørt fyri at hjálpa okkum, er stórur vandi fyri, at vit verða álopin og myrd. Tit mugu hjálpa okkum, sigur Ibrahim Faltas, prestur á sjónbandsupptøkuni.

Ísraelski herurin sigur, at fleiri av palestinunum, sum hava leitað sær skjól í kirkjuni, eru yvirgangsmenn, men herleiðslan hevur kortini givið sínum hermonnum boð um ikki at leypa á. Fyrrakvøldið ljóðaði, at samráðingar eru millum ísraelsmenn og palestinararnar, sum eru inni í kirkjuni.

### Veksandi mótmæli

Samstundis sum flestu lond í Vesturheiminum við USA og ES á odda leggja altsamt størri trýst á Ísrael og palestinararnar fyri at fáa teir at steðga harðskapinum, eru studentar og onnur í teimum arabisku londunum farin at mótmæla tí, sum tey kalla ísraelska áganginum ímóti palestinska fólkinum. M. a. hava egyptiskir og libanskir studentar gingið mótmælisgongu.

Tað greiðasta mótmælið kom mikudagin, tá egyptiska stjórnin boðaði frá, at hon hevur slitið alt samband við ísraelsku stjórnina, men at tað diplomatiska sambandið kortini stendur við. Egyptaland og Jordan eru tey einastu arabisku londini, sum hava diplomatiskt samband við Ísrael.

Egyptaland hevur kortini ikki havt nakran sendiharra í Tel Aviv síðani í november í 2000, tá stjórnin í Kairo gjørdi av at taka sendiharran heim fyri at mótmæla framferðini hjá ísraelsku stjórnini ímóti palestinum.

# Russar selja vápn sum ongantíð fyrr

**Russiski vápnaútflutningurin fer at seta met í ár, siga myndugleikarnir í Moskva**

RUSSLAND
*Árni Joensen*

Almennu hagtølini hjá russisku myndugleikunum siga, at landið fer at selja vápn í ár fyri meiri enn 30 milliardir krónur. Tað er einar fimm milliardir meiri enn í 1996, sum er metárið higartil.

Vesturlendskir hernaðarserfrøðingar ivast kortini í tølunum. Teir halda, at tann veruligi vápnaútflutningurin er størri, enn almennu russisku tølini vísa.

Stjórin í felagnum, sum stendur fyri vápnaútflutninginum, Andrej Baljaninov, segði fyrr í vikuni, at felagið er júst liðugt at samráðast við nakrar keypararar, og at samráðingarnar høvdu gingið væl. Hann legði afturat, at keypararnir høvdu serliga víst áhuga fyri teimum russisku loftverjuskipanunum.

India er tað landið, sum keypir flest vápn úr Russlandi. Hildið verður, at ein triðingur av russsiska vápnaútflutninginum fer til India.

Úr Norðurlondum:

## Pápi er ikki pápi

Kanningar hjá heilsumyndugleikunum í Noregi og Svøríki hava avdúkað, at 20. hvørt barn í teimum báðum londunum veksur upp saman við einum pápa, sum í veruleikanum als ikki er pápi teirra.

Bertil Lindholm, sum starvast hjá heilsumyndugleikunum í Linkøping í Svøríki, sigur, at fimm prosent av teimum svensku børnunum veksa upp saman við einum manni, sum tey halda er pápi teirra, men sum kortini ikki er tað. Margrethe Steensen hjá heilsumyndugleikunum í Bergen sigur, at hóast hetta sama ikki er prógvað í Noregi, er neyvan nakað at ivast í, at viðurskiftini eru tey somu har.

Norsku heilsumyndugleikarnir gera á hvørjum ári umleið 1300 DNA-kanningar, tá ivi er um, hvør pápin er. Hagtølini vísa, at nógvir pápar eru als ikki pápar, tá saman um kemur.

## Givnir at leita

Danska Tipstænastan er givin at leita eftir manninum, sum herfyri vann 9,3 milliónir krónur í Lotto-spælinum. Tipstænastan veit, at maðurin var í einari kiosk í býarpartinum Sædding í Esbjerg við seðlinum, men tá hann ikki hevði stundir at bíða, meðan kvinnan í kioskini kannaði, um hann hevði vunnið, skuldi hann koma aftur. Tað vísti seg, at maðurin hevði vunnið 9,3 milliónir krónur, men hann kom ongantíð aftur í kioskina.

Tipstænastan og løgreglan í Esbjerg hava síðani roynt at finna mannin, men uttan úrslit. Hann hevur tó framvegis møguleikan at fáa pengarnar, tí teir fella ikki aftur til Tipstænastuna fyrr enn eitt ár eftir drátttin.

Kemur maðurin ikki eftir pengunum, er hetta tann største vinningurin hjá donsku Tipstænastuni, sum ikki verður útgoldin.



stig á fullveldisleiðini.

Hugtakið frælsi er eisini tætt knýtt fullveldishugsjónini hjá Tjóðveldisflokkinum, og hetta fær eisini rúmd í valskránni. Aðrar flokkara hava eisini í sínum valskráum nýtt hugtakið frælsi.

–Frælsi er eitt nógv misbrúkt orð. Vit meta ikki, at frælsi er at sleppa undan nøkrum ella fáa okkurt. Frælsi er ein rættur, sum krevur av okkum ábyrgd og stríð, sigur Høgni Hoydal.

Tjóðveldisflokkurin sigur seg ynskja eina veruliga vælferð, har Føroyar taka ábyrgd og eru búskaparliga sjálvbjargnar.

–Verulig vælferð er bygd á rættin hjá øllum til at liva eitt gott lív við sjálvsvirðing í egnum landi – ikki á olmussu og heftni, skrivar Tjóðveldisflokkurin í valskránni.

Tjóðveldisflokkurin ynskir framhaldan at arbeiða fyri at seta ein búskapargrunn á stovn. Útrokningar hjá Tjóðveldisflokkinum siga, at við mettum búskaparvøkstri, so kann blokkstuðulin koma niður á 190 mió. kr. í 2006. Við teimum góðu búskaparligu tíðum og útlitum, so heldur Tjóðveldisflokkurin, at avgerandi stig kunnu takast fyri føroyska búskapin í royndunum at gerast sjálvbjargin.

Eisini her er talan um eitt lagnuval.

### Samgonga

Millum tíðindafólki á tíðindafundinum hjá Tjóðveldisflokkinum var áhugin størstur fyri at spyrja um samkomumøguleikarnar. Hinir tríggir stóru flokkarnir í Føroyum hava lagt fram teirra valskrá. Eingin av hinum flokkunum hevur nevnt Tjóðveldisflokkin sum fremsti møguleikin fyri samgongufelaga. Fólkaflokkurin segði í sambandi við teirra valskrá, at teir sóu nógvar møguleikar, hóast teir áður hava givið til kennar ein stóran áhuga fyri at halda saman við sjálvstýrisfelaganum, Tjóðveldislflokkinum. Hvørki Tjóðveldisflokkurin ella Sambandsflokkurin síggja nakað møguligt samstarva flokkana millum, hóast teir hava samstarva áður. Javnaðarflokkurin hevur heldur ikki víst serliga stóran áhugi fyri at koma í samgongu við Tjóðveldisflokkin.

Á tíðindafundinum segði Høgni Hoydal, at teir meta tað sum fortreytin fyri fullveldi, at Tjóðveldisflokkurin kemur sterkur inn á ting.

–Ynskiligt fyri flokkin hevði verið um Tjóðveldisflokkurin kom so sterkur inn á ting, at mann ikki kundi síggja burtur frá honum í samgongumøguleikum. Tað tykist sum um, at hinir flokkarnir lata hurðarnar aftur fyri Tjóðveldisflokkinum, men vit vilja fegnir lata tær uppaftur, og vit avvísa ikki nøkrum, sigur Høgni Hoydal.

Á tíðindafundinum settu fleiri síni vón til, at Javnaðarflokkurin fór at venda kós í sjálvstýrisspurninginum, og hetta kundi verið rættiliga avgerandi fyri framtíðina. Javnaðarflokkurin hevur boðað frá, at hann ynskir eina loysn innanfyri ríkisfelagsskapin. Annita á Fríðriksmørk helt tað í fleiri førum vera ein spurningur um tulkingar av orðum, og partarnir í veruleikanum liggja nógv tættari at hvørjum øðrum. Hóast hetta, so tóku fleiri kend valevni til orðanna um teir skeivleikar og ómøguligheitir, ið tey meta vera í valskrá Javnaðarfloksins.

Lítið og einki varð tosað um Fólkaflokkin á fundinum. Høgni Hoydal vildi ikki gera viðmerkingar til, hvørja støðu, hann helt vera ynskiliga fyri Fólkaflokkin til komandi val.

### Lægri skatt

Tað er eitt rættiliga fyllismikil valskrá, ið Tjóðveldisflokkurin hevur fyrireikað til løgtingsvalið.

Á vinnuliga økinum ynskir Tjóðveldisflokkurin at halda áfram við kósini higartil. Vinnulívið skal framhaldandi ikki stuðlast av tí almenna.

Tjóðveldisflokkurin hevur eisini sett lægri inntøkuskatt í valskránna. Høgni Hoydal sigur seg ikki vilja fara út at lova nakað tal ella dato, men hann sigur flokkin ynskja at lætta um skattatrýstið.

### Grundlógartryggjað rættindi

Eldrarøkt, dagsstovnar og bústaðarmøguleikar skulu vera tryggjað øllum. Tjóðveldisflokkurin leggur í valskránni stóran dent á, at tryggja rættindi á sosiala økinum við lóggávu.

Røktarheim og eldrarøkt skulu tryggjast tey næstu árini. Land og kommunur skulu virka saman um at loysa hetta. Millum annað ætlar Tjóðveldisflokkurin at seta 100 mió. í eina íløgupulju, sum kommunur, treytað av samstarvi, kunnu søkja um part av.

–Vit halda ikki meira enn hini lova, segði á Høgni Hoydal á tíðindafundinum. Og tað er heldur ikki so lítið.

NordJobb í Føroyum:

# Ger tað møguligt at fara uttanlands at arbeiða

**Hevur tú hug at nýta summarfrítíðina til okkurt øðrvísi, so kann NordJobb í Føroyum bjóða tær arbeiði í einum av hinum Norðurlondunum**

SUMMARARBEIÐI
*Ragnhild Ellingsgaard*



*Karl Birgir Isaksen, formaður í NordJobb í Føroyum*

**Klaksvík:** Hevur tú ikki nóg mikið av peningi til at halda summarfrítíð uttanlands, so er hetta eingin forðing fyri dreyminum um eina uttanlandsferð.

Ert tú millum 19 og 26 ár, so gevur NordJobb í Føroyum tær møguleika fyri at fara til eitt av Norðurlondunum í summarfrítíðini at arbeiða.

### Uppliva norðurlenska mentan

Karl Birgir Isaksen, formaður í NordJobb í Føroyum, sigur, at endamálið við NordJobb er at styrkja um samanhaldið í Norðurlondum. Við í samstarvnum eru Finland, Grønland, Danmark, Ísland, Noreg, Svøríki, Áland og Føroyar.

– Vit ynskja at bjóða ungum fólki undir víðari útbúgving møguleikan fyri at uppliva hini Norðurlondini og tað norðurlenska samstarvið, umframt at vit eisini ynskja at norðurlenska málið verður léttari at skilja fyri øll, sigur Karl Birgir.

Umframt eitt summararbeiði uttanlands, so skipar Nord Jobb eisini fyri ymsum frítíðarvirksemi, so tú kemur at kenna landið, tú arbeiður í, betur. Umframt hetta verður tú eisini ein stóran part av tíðini saman við øðrum ungum fólki, sum eisini eru við í NordJobb-samstarvinum.

– Á henda hátt uppliva tey ungu ikki bara mentanina í landinum, tey hitta samstundis ung fólk frá fleiri norðurlendskum londum í senn, øll við hvør síni mentan, greiðir Karl Birgir frá.

### Styrkja norðurlenskt samstarv

Norðurlond hava í fleiri ár havt ein felags arbeiðsmarknað, sum ger, at ikki er neyðugt at søkja um arbeiðsloyvi í hvørjum einstøkum landi.

– Hettta er ein av fyritreytunum undir NordJobb, umframt at vit eisini vilja styrkja um tað norðurlenska samstarvið, sigur Karl Birgir.

– Vit kunnu betur gera gagn av vitanini hjá hvør øðrum, um vit arbeiða tætt saman. Eitt tætt samarbeiði millum lond gevur eisini eina ríkari mentan, samstundis sum møguleikarnir fyri útbúgving og arbeiði gerast nógv størri.

Karl Birgir leggur afturat, at eitt tætt samstarv gevur eina betri samskipan á tí altjóða pallinum.

– Við eini felags dagskipan kunnu vit verða við til at virka fyri einum friðaligum Europa, samstundis sum mentunnarlívið í hvørjum einstøkum landi gerst ríkari av einum góðum samstarvi, sigur Karl Birgir.

### Øll kunnu søkja

– Tað einasta, vit krevja av umsøkjarnunum, er, at tey eru millum 19 og 26 ára gomul, og duga at tosa og skilja danskt, norskt og svenskt, sigur Karl Birgir.

– Síðan finna vit fram til ymsar arbeiðsgevarar, sum so velja út, hvønn teir ynskja at fáa til arbeiðis.

Annars sigur Karl Birgir, at arbeiðspláss ini, sum NordJobb bjóðar fram, eru sera ymisk.

– Í Føroyum kanst tú til dømis hjálpa einum bónda, meðan tú í Svøríki møguliga sleppur inn á eina elverksmiðju. Arbeiðini spenna víða, og vit skuldu havt okkurt til øll, sigur hann.

Freistin fyri at søkja um at verða við í NordJobb er sett at verða tann 1. juni. Meir kunning er at finna inni á heimasíðuni, sum er www.nordjobb.net.

# Steindeytt um alternativar fiskiroyndir

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Herfyri fýltist Mannbjørn Solmunde, skipari á Tvøroyri á, hví vit ikki gera fleiri alternativar fiskiroyndir, nú meðan tíðirnar eru góðar.

- Eg eri púra samdur við honum í hesum, sigur ein annar skipari á Tvøroyri, Viberg Sørensen, sum saman við Mannbirni gekk á odda í føroyskari garnaveiði eftir havtasku og svartkalva.

Eins og Mannbjørn, heldur Viberg, at vit áttu at lagt størri dent á alternativar royndir, meðan tað gongur væl.

- Gamalt er, at neyð lærir nakna kvinnu at spinna, og soleiðis hevur tað ofta eisini verið í fiskivinnuni.

Hann vísir á, at meðan alt gongur væl, verður minni hugsað um aðrar møguleikar enn teir, ið vit vita roynast.

- Menniskjan er nú einaferð soleiðis, at vit vilja gera tað, sum vit vita loysir seg - og treyðugt tað, sum kann vera ivingarsamt, sigur Viberg.

### Svart rogg!

Herfyri varð ikki so lítið gjørt burtur úr, at onkur bátur hevði fingið eina havtasku við svørtum roggi.

- Fiskirannsóknarstovan gjørdi sínar viðmerkingar til hetta fyribrigdi, sum um hetta vóru stórtíðindi, sigur Viberg, sum annars dugir væl at taka til.

Hann heldur, at er hetta tey størstu rannsóknar tíðindini á fiskivinnuøkinum, stendur ikki væl til. Viberg eigur garnabátin, Anitu, og hann sigur, at teir hesi árini, skipið hevur verið á garnaveiði, hava fingið fleiri tons av havtasku við svørtum roggi.

- Eg haldi avgjørt, at vit áttu at lagt størri dent á alternativar fiskiroyndir í góðum tíðum, enn vit gera. Hesar kundu verið kærkomnar, tá ið tað aftur fer at ganga hinvegin, sigur Viberg Sørensen.

# Bjóða pensionistum til Danmarkar

FERÐING
*Vár Gaard, praktikantur*

Pensionistafelagið Salling, Løgstør, í Danmark bjóðar føroyskum pensionistum niður á vitjan, frá 6. august til 12. august.

Tey ið koma við skulu búgva privat hjá pensionistum í Danmark, men síggjast hvønn dag. Kostnaðurin fyri sjálvt uppihaldi í Danmark er 800,- fyri hvønn, men tey skulu gjalda ferðina millum Danmark og Føroyar og aftur sjálvi. Tað kunnu ikki verða meiri enn 24 og ikki minni enn 10 fólk við á túrinum.

Tað verður nógv áhugavert á skránni. T.d. koma tey at síggja »Gammel Estrup Landbrugsmuseum« í Eysturjútlandi, og mikudagin 7. august, verður farið við bussi til Thorseminde í Vesturjútlandi, har tey millum annað koma at síggja eitt museum, har lutir sum eru komnir frá skipum ið eru strandaði har, verða vístir fram. Tey koma eisini at hoyra um skipið Sct. George, sum strandaði í Thorseminde í 1811. Tað var eitt brekst herskip, og har doyðu nógvir menn.

Nærri upplýsingar kunnu fáast hjá Símun P. Poulsen í Fuglafirði á tlf 444191 ella fax 444191.